## Blaðið Ð fingið nýggja heimasíðu

Nýggj heimasíða er løgd út og tað er blaðið Ð, sum stendur fyri síðuni, ið kallast www.edd.fo.

Øll Ð bløðini eru á síðuni og Jógvan á Høvdanum, yngri, ið er blaðstjóri sigur, at síðan verður dagførd einaferð um dagin, so at tað gerst áhugavert at vitja síðuna dagliga.

## Nógv vitjandi á Planet.fo

Planet.fo slóð sítt egna met fyri vitjandi í farnu viku, við 14.425 brúkarum sambært vevmátingarlistanum hjá Gallup og liggur í farnu viku á tryggum øðrum plássi.

Nýggjur vevmátingarlistið hjá Gallup verður almannakunngjørdur hvørja viku, og hesa vikuna eru fleiri síðir, ið hava sláa egin met, millum annað planet.fo, sum vanliga kappast við sportal.fo og nummar.fo um annað pláss á listanum aftan fyri portal.fo. Hesa vikuna er talið á vitjani á planet.fo farið upp við 33,2%. Eisini talið á vitjanum 32.445 og á sýndum síðum 106.019 eru munandi hægri enn vikuna fyri.

Men planet.fo er sambært gallup.fo ikki einasta heimasíða, ið tekur egið met eisini bio.fo við 1.068 brúkarum, televarp.fo við 1.003 brúkarum, vinnuvitan.fo við 662 brúkarum, trade.fo við 376 brúkarum sláa egið met.

# Ljómur, solistar og full kirkja

**Ljómur skipaði í sunnukvøldið fyri árligu Allahalgannakonsertini í Vágs Kirkju. Hetta gjørdust tveir tímar, ið gingu skjótt, og fullsett kirkja bar boð um, at áhoyrarar njóta gomlu konsertsiðvenjuna**



*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Klokkan 18 í sunnukvøldið skipaði Kirkjukórið Ljómur fyri árligu Allahalgannakonsertini, sum hevur verið afturvendandi tiltak síðani 1940.

Skráin var fjølbroytt. Ljómur sang og eisini vóru fleiri kórlimir solistar. Hesir hava verið á sangskeiði hjá Súsonnu Brattaberg. Tey sungu klassisk verk eftir t.d. Mozart, Schumann, Bartholdy og Beethoven.

Solistar vóru Karin Brattaberg, Arnóra B. Petersen, Tóra Vestergaard, Kristian Holbæk og Sigmundur Olsen. Eisini framførdu Beinta, Essan, Henning og Susanna verk hjá Schumann

Umframt sálmasang frá kórinum, var eisini felagssangur. Mikkalina Tausen leikti tvørfloytu, meðan Anki Dýrdarklett Hansen hevði klaverfylgispæl, og skúlanæmingar úr Vágs Skúla sungu og spældu eisini.

Patrick de Neergaard, prestur, segði nøkur orð, og sum vanligt er, verður konsertin skipað við offurgongd og tá syngur kór og kirkjufólk "Nú Hvítna Tindar", sum Robert Joensen setti føroysk orð til og gjørdi hann hetta á sinni í samband við framførslu hjá Ljómi.

Jens Mortan Mortensen stjórnaði Ljómi og Niels Nolsøe hevði urgu- og klaverfylgispæl.

Vágs Kirkja var fullsett og teir tveir tímarnir runnu skjótt. Eftir konsertina hevði Ljómur opið hús fyri luttakarum og áhoyrarum í nýkeyptu húsum sínum, ið eru beint vestanfyri kirkjuna.

# Samstarv við Ísland á heilsuøkinum

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, hevði mikudagin 1. november fund við íslendska heilsumálaráðharran, Siv Friðleivsdóttir, um møguleikarnar fyri einum tættari samstarvi millum Ísland og Føroyar á heilsuøkinum. Tað var ein sera positivur fundur, har avgjørt varð, at embætisfólk frá báðum londunum skulu fara undir at gera eina útgreining av samtarvsmøguleikum. Fundur hevur fyrr í ár verið millum leiðslurnar á Landssjúkrahúsinum og Landspitalinum um samstarv. Hetta arbeiðið heldur áfram, og ætlanin er, at samstarvið millum sjúkrahúsini verður víðkað til eisini at fevna um onnur heilsupolitisk øki. Íslendski ráðharrin bjóðaði landsstýrismanninum á vitjan í Íslandi í byrjanini av komandi ári í sambandi við komandi avtaluna.



*Ingimar Einarsson, Katrin Gaard, Siv Friðleifsdóttir, Hans Pauli Strøm og Gert Poul Hansen á Christiansborg í Keypmannahavn*

## Heiti hylurin eitt vælvitjað tilboð

**Leygardagar hevur svimjihylurin í Vági sonevndan heitan hyl, og tá eru t.d. børn og tey eldru serliga glað fyri hylin**

HEITUR HYLUR

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

At hylurin er nøkur stig heitari leygardag, enn aðrar dagar, er eitt kærkomið tilboð, ið alt fleiri suðuroyingar njóta.

Dagurin er býttur upp, so at børn, pensjónistar og foreldur við smábørnum hava ávísar tíðir á degnum at njóta heita hylin.

Og tilboðið er vælvitjað og ber tað boð um, at hetta er eitt tilboð, ið fólk fegnast um.